# Injector vinna fram á altjóða marknaðinum

**– Stór menning er í seinastuni farin fram við teimum væl kendu Injector trollemmununum, sum flogverkfrøðingurin, Helgi Larsen, á sinni designaði. Trý nýggj sløg eru nú komin aftrat, og sølan hevur tikið dik á seg á altjóða marknaðinum, sigur sølumaðurin, Jan-Allan Müller**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað vóru Injector Sharklemmarnir, ið flogverkfrøðingurin, Helgi Larsen, designaði, sum gjørdust gjøgnumbrotið hjá vágbingum.

Jan-Allan Müller, sølumaður, sigur, at nú felagið hevur trý nýggj modellir á síni vørusskrá, hevur sølan í útnorði og fjarskotnu londunum í Suðurevropu, Miðeystri, Norðurameriku og Suðurameriku vundið væl upp á seg.

Injector-lemmarnir verða í stóran mun framleiddir í Litavia, meðan tilhoyrandi eykalutir og kjølar verða framleiddir í Kina.




*– Injector-lemmarnir hava eitt sera gott orð á sær og verða roknaðir sum heimsins bestu, sigur Jan-Allan Müller, sølumaður*



*Injector-lemmarnir verða framleiddir eystanfyri, men sølumaðurin, Jan-Allan Müller heldur, at føroyski samleikin framvegis hevur sín týdning*

### Heimsins bestu

– Injector-lemmarnir hava eitt sera gott orð á sær og verða roknaðir sum heimsins bestu, sigur Jan-Allan Müller og vísir á, at teir alla tíðina arbeiða miðvíst við menning og marknaðarføring.

Hann leggur dent á, at kappingin á marknaðinum er sera hørð, og tí er avgerandi, at framleiðslan er nógv betri enn hon, ið kappingarneytarnir kunnu bjóða.

Brúkarin skal ikki vera í iva um sín tørv, tá ið skiftast skal út – ella nýtt skal keypast, sigur sølumaðurin.

Injector og Helgi Larsen vænta eisini, at kappingin á marknaðinum fyri trollemmar fer at gerast uppaftur harðari, enn hon er í dag.

– Skulu vit framhaldandi kunna vinna marknaðarpartar og standa okkum í kappingini, er neyðugt at leggja sera stóran dent á menning og marknaðarføring.

### Føroyski samleikin

Ein partur av hesum er tann føroyski samleikin hjá Injector, og tað eru framvegis føroyingar, sum standa aftanfyri menningina og marknaðarføringina av Injector-lemmunum.

– Tað at vit eru føroyingar, hevur sjálvandi sín t‡dning, hóast vit framleiða í eysturlondum, sigur Jan-Allan Müller.

Hann vísir á, at felagið hevur sera gott samstarv við nógvar føroyskar fyritøkur, og soleiðis umboðar trolvirkið Vónin lemmarnar í fleiri londum.

– Sum heild er galdandi, at Injector-lemmarnir geva eina økta veiði í mun til aðrar lemmar, og haraftrat spara teir skipunum fyri orku, sigur hann.

### Nógvar bíleggingar

Jan-Allan Müller sigur, at felagið í seinastuni hevur fingið bíleggingar úr londum sum Argentina, Kanada, Ísrael, Sameindi Arabisku Emiratunum, Ruslandi og Peru.

– Aftrat hesum, er eftirspurningurin framvegis stórur í Noregi, Íslandi og Grønlandi umframt í norðurlondum yvirhøvur, sigur sølumaðurin.

# Injector Scorpion – stjørnuskotið hjá Injector

**Injector Stealth, Injector Sea Wolf og Injector Scorpion eru nýggju lemmarnir, sum Injector hevur framleitt**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í løtuni roynir eitt føroyskt nótaskip teir nýggju pelagisku trollemmarnar, Injector Stealth. Hetta er eitt heilt nýtt design, ið avloysir flótitrollemmin, Injector Dropi, sum ongantíð fekk nakað veruligt gjøgnumbrot.

– Vit vóna, at tað pelagiska gjøgnumbrotið fer at koma við Injector Stealth, sigur Jan-Allan Müller, sølumaður.

Hann sigur, at felagið í ár fer at royndarkoyra tvey nýggj sløg av lemmum til flótitrol, og hesir lemmar eru bygdir á heilt nýggj fyribrigdi innan flótitrol.

– Hesum vænta vit okkum nógv av, sigur sølumaðurin.

Umframt Injector Stealth, hevur Injector eisini framleitt Injector Sea Wolf, sum serliga eru ætlaðir smærri trolarum.

– Hesin eru royndarkoyrdir í heyst við óvæntað góðum úrslitum, bæði í Føroyum, Íslandi og Spaniu.

Triðja nýggja modellið hjá Injector, er Injector Scorpion, sum er stjørnuskotið hjá felagnum.

– Hesir trollemmar hava eginleikan at kunna skifta lættliga millum troling á djúpum og á grunnum vatni. Teir eru gjørdir úr eykastyrktum stáli.

Jan-Allan Müller sigur, at Scorpion serliga er ætlaður til tey mest torføru botnviðurskiftini, og modellið er nýliga tikið í nýtslu umborð á føroyska flakatrolaranum, Skálabergi og grønlendska rækjutrolaranum, Markusi.

– Vit hava fingið sera góð ummæli um hesar lemmar, sigur sølumaðurin.




*Injector Scorpion er stjørnuskotið hjá Injector*